## 1,2 milliardir fyri Ronaldo

Tað eydnaðist nýggju eigarunum av Manchester City, Abu Dhabi United Group for Development and Investment, at keypa Robinho frá Real Madrid fyri á leið 300 milliónir krónur. Og sambært stjóranum í Abu Dhabi, Dr Sulaiman Al Fahim, er næsta stigið ikki minni stórsligið. 240 milliónir dollarar - ella 1,2 milliardir krónur - sigst felagið ætla at bjóða Manchester United fyri Ronaldo, tá transfer-vindeygað letur upp í januar mánaði.



## Aganevndin taka støðu til leikbann

Á fundi í gjár tók Kappingarnevndin støðu í málinum um møguligt leikbann til tveir spælarar hjá Víkingi og ein spælara hjá B36. Sjónvarpsmyndirnar eftir dystin millum Víking og B68 í seinastu viku vístu, at Atli Gregersen og Hans Jørgen Djurhuus hvør í sínum lagi royndu at fella Jann Inga Petersen hjá B68, tá hesin fegnaðist um óvæntaða sigurin. Á fundi í gjár viðgjørdi Kappingarnevndin málið. Endaligi úrskurðurin skal takast av Aganevndini, men Kappingarnevndin heitir nú formliga á Starvsnevndina um at senda málið til Aganevndina, sum so skal viðgera málið. Sum skilst við tilmæli um, at Atli Gregersen fær ein dyst leikbann og at Hans Jørgen Djurhuus fær tveir daga leikbann. Somuleiðis viðgjørdi nevndin hendingina, har Herbert í Lon Jacobsen hjá B36 rendi Andreas Lava Olsen umkoll, og her var niðurstøðan tann sama. Sum skilst kann Herbert rokna við leikbanni í ein dyst.

## ÍF Føroyar aftur á sigurskós

**Eftir trilvandi byrjan eftir summarsteðgin komu føroysku útisetarnir aftur á sigurskós, tá teir við Erlingi Fles á odda vunnu 4-2 á FA 2000 í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

ÍF Føroyar førdi heili 3-0 stutt fyri leiklok. Men seinastu tíggju minutt-irnar mátti føroyska liðið spæla uttan miðverjan Jákup Olsen, sum fekk gult kort. Tá hetta hendi førdi ÍF Føroyar 2-0. Tað eydnaðist at økja stutt eftir, at teir gjørdust ein maður færri, men so gjørdist tað óneyðuga spennandi, tá gestirnir FA 2000 gjørdu tvey skjót mál og støðan gjørdist 3-2.

Henda spenning hóvaði Erlingi Fles lítið. Hann hevur gjørt eina rúgvu av málum fyri ÍF Føroyar í ár, og við sínum triðja máli í dystinum staðfesti hann sigurin, tá hann rann frá verjuni og framvið málverjanum og skoraði trygt. Hin málskjúttin hjá ÍF Føroyum var Palli Augustinussen.

Serie 1, har ÍF Føroyar luttekur, byrjaði aftur eftir summarsteðgin í august. Av fýra teimum fyrstu dystunum eftir steðgin, tapti ÍF Føroyar tríggjar og vann ein. Nú kom næsti sigurin í fimtu royndini.

# Gott vikuskifti hjá føroyskum triathletum

**Tað var ikki bara Joan Bláfoss, ið stóð seg væl í vikuskiftinum. Eisini gekk væl hjá Gudmund Joensen og Gunnar Dahl-Olsen**

TRIATHLON

*Tíðindaskriv*

Føroysku fjølmiðlarnir skrivaðu í vikuni, at sera væl hevði gingið hjá Joan Bláfoss, ið luttók í HM í Triathlon sunnudagin í Hollandi. Sjálv gjørdist Joan nummar sjey, men saman við landsliðsfeløgum sínum gjørdist hon HM vinnari. Ein fantastiskt avrik á einum so longum teini. Joan skuldi svimja 4 km, súkkla 120 km og síðan renna 30 km.

Gott hevur gingið hjá øðrum eisini, og í stórari kapping í Silkeborg sunnudagin gekk eisini sum eftir ánni hjá evnaríka Gudmund Joensen og Gunnar Dahl-Olsen.

Gudmund kappaðist í fjórðings ironman og Gunnar á hálvum ironman.

### Gudmund nummar fimm

Gudmund og hansara kappingarneytar skuldu fyrst svimja 950 metrar, síðani súkkla 45 kilometar og at enda renna 10,5 kilometrar.

Gudmund er sterkur á øllum trimum greinunum, men hevur ikki íðkað triathlon í so mong ár, sum fleiri av hansara kappingarneytum, og tí kann hann við miðvísari venjing gerast enn betur. Hann var millum teir fremstu í svimjing og var tí eisini millum teir fyrstu upp á súkkluna. Her gekk eisini væl og tá renning er sterkasta síðan hjá Gudmund, ja so kundi tað bara ganga gott. Tað gjørdi tað eisini, og av 150 luttakarum gjørdist Gudmundur fimtur á málið.

### Gunnar vann

Tað bleiv til ein eitt sindur longri túr hjá Gunnari. Hann hevði sett sær fyri at royna ½ Ironman á fyrsta sinni. Gunnar skuldi fyrst svimja 2 kilometrar, síðani súkkla 90 km og at enda renna hálvt marathon, tvs. góðar 21 km.

Sterkasta kortið hjá Gunnar er súkklingin. Men væl gekk í svimjingini sunnudagin og var hann millum teir fyrstu úr Almindsø við Silkeborg. Tað gekk væl í súkklingini eisini, meðan renningin var heldur drúgv at koma ígjøgnum. Samanlagt gekk gott, tí fyrstur á mál í sínum bólki gjørdist Gunnar, ið vann við tíðini 4 tímar 55 minuttir, heilar seks minuttir framman fyri nr. 2.

Gunnar sigur soleiðis um kappingina:

Eg haldi at svimjingin og súkklingin gingu rættiliga væl. Eg royndi at halda aftur í svimjingini fyri at spara kreftir til hinar teinarnar. Í súkklingini gav eg tó alt eg átti fyri at fáa nakað at geva av, tá eg skuldi út á langa renniteinin. Veika síðan hjá mær er renningin og tí mátti eg vinna so nógva tíð sum gjørligt í súkklingini. Síðstu kilometrarnir vóru øgiligir at renna, men við at hugsa positivt, ja so føldist tað ikki so strævið, segði Gunnar eftir sigurin.



*Gunnar Dahl Olsen kom fyrstur um málið, tá hann um vikuskiftið tók lut í kapping á hálvum ironman-teini*

# Sylla skal skora á Amager

**Bert loyvispappírini frá danska útlendingastýrinum vanta, áðrenn ivorianin og FC Amager undirskriva sáttmála**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Todi Jónsson, stjóri í FC Amager, váttar, at semja er millum partarnar um treytirnar fyri einum sáttmála.

Ahmed Davy Sylla spældi fyri ÍF og B36 árini



*Sylla varð í fjør vandamesti áleyparin í føroyskum fótbólti. Eftir hálvt ár á Malta er hann nú til reiðar at skjóta mál fyri FC Amager og Toda Jónsson*

2005 til 2007, og ikki minst hevði hann eitt framúrskarandi kappingarár í fjør, tá hann gjørdist toppskjútti í Formula-deildini.

Hann hevur síðani spælt við Birkirkara á Malta, sum kendi svian av skjótleika hansara, tá B36 vann á maltesisku meistarunum í undankappingini til Champions League í 2006.

Og nú er so ætlanin, at hann skal spæla við FC Amager.

- Vit hava fingið allar smálutir upp á pláss, og nú bíða vit bert eftir játtandi svari frá danska Udlændingestyrelsen, sigur Todi Jónsson, stjóri í FC Amager.

Sáttmálin millum FC Amager og Sylla er galdandi í hálvt triðja ár.